VB-Søljan 33-13(15-6):

# Stórsigur til føroyameistararnar

**Vágskvinnur fingu sunnudagin annan stórsigurin hetta vikuskifti, tá ið Søljan vitjaði í Vági**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

VB gjørdi eitt gott hál um vikuskiftið. Leygardagin var Tjaldur á vitjan í Vági, og sunnudagin vitjaði Søljan. Í báðum førum vunnu føroyameistararnir ein tryggan sigur.

### Daiva í serflokki

Eins og í dystinum leygardagin, so vísti dysturin sunnudagin, at litaviski stórskjúttin hjá VB, Daiva Tomaite, er í einum flokki fyri seg. At Daiva nú hevur fingið landsliðsboð úr Litava, man neyvan verða meira, enn hvat hon hevur uppiborið. Vikuskifti eftir vikuskifti vísir hon sínar dygdir í hallum kring landið, og bara í teimum báðum dystunum, sum VB leikti um vikuskiftið, skeyt hon ikki færri enn 25 mál tilsamans.

Í dystinum sunnudagin fylgdi Søljan við VB fyrsta korterið, men so var liðugt. Heimaliðið rann gestirnar um koll restina av dystinum, og trúfastu áskoðararnir hjá meistarunum vóru vitni til eina veruliga avsmyrjing.

**VB-Søljan 33-13(15-6)**
**VB:** Daiva Tomaite 12(4), Rannvá Augustinussen 5, Sváva Vestergaard 5, Laila Jespersen 4, Marina Zylko 4(2), Christina Holm 2, Margreth Augustinussen 1
**Søljan:** Fía Selma Nielsen 3(1), Hertha Simonsen 3, Heidi Maria Akselsen 2(1), Jana Jacobsen 2, Arnleyg Haraldsen 1(1), Louisa Niclasen 1, Sólja Jóanisdóttir 1(1)
**Brotskøst:** VB 8(6), Søljan 8(4)
**Útvísingar:** VB 1, Søljan 5
**Dómarar:** Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

KÍF-VÍF 22-23(12-14):

# Vestmenningar mundu mist á stokkinum

**Tað var um reppið, at føroyameistararnir úr VÍF tveittu ein at síggja til tryggan sigur fyri borð, tá ið teir dystaðust við KÍF í Hoyvíkshøllini sunnudagin.**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Hóast VÍF hevði at síggja til púrasta trygga leiðslu, so var kortin ium reppið, at kollfirðingar tóku øll á bóli*

*savnsmynd*

Bæði KÍF og VÌF hava fingið eina heldur trilvandi byrjan upp á kappingarárið, tí høvdu bæði liðini fyri neyðini at fáa ein sigur í hús. Í dystinum sunnudagin sá tað leingi út til, at vestmenningar fóru at vinna ein tryggan sigur, men seinastu løtuna var um reppið, at teir tveittu alt burtur.

### Argaði gomlu liðfelagarnar

Undan hesum kappingarárinum hevur KÍF fingið nakrar nýggjar leikarar. Damir Oros er komin aftur eftir eitt ára útlegd í Neistanum, og so er ungi Karl Johan Djurhuus komin úr júst VÍF. Tað var eisini júst Karl Johan, sum var ein støðug hóttan fyri verjuna hjá vestmenningum, og ferð aftaná ferð sn‡tti kviki vongurin gomlu liðfelagarnar.

Í fyrra hálvleiki gekk eisini rættuliga javnt á, og liðini skiftust um at hava leiðsluna. Síðstu løtuna fyri steðgin gjørdi VÍF tó ein vørr og fekk trý mál á rað, og tí fóru teir til hálvleiks við eini tveymáls-leiðslu.

Vestmenningar løgdu fyri eftir steðgin á sama hátt, sum teir høvdu gjørt beint fyri hálvleik, og hetta gav teimum tr‡ mál, áðrenn tað eydnaðist KÍF at svara aftur. Kollfirðingar royndu at fáa fatur í vestmenningunum aftur, men tað gekk striltið. Tá ið so Rói Lamhauge, sum hevði 20 ára føðingardag sunnudagin, legði VÍF á odda 23-17 eini níggju minuttir fyri leiklok, tóktist eingin ivi verða um, at sigurin var vestmenningum vísur.

Men kollfirðingar vildu tað øðrvísi, og teir fóru undir ein veruligan endaspurt, samstundis sum bæði verja og álop hjá VÍF steðgaði upp. KÍF fekk eitt mál fyri og annað eftir, og munurin millum liðini bara minkaði.

Við sera offensivari verju fingu kollfirðingar órógvað føroyameistararnir so mikið, at teir gjørdu nógv óneyðug mistøk, og tey vóru so revað í hinum endanum. Spælið var ikki vakurt hesa løtuna, men hinvegin gjørdist dysturin spennandi aftur. Trúføstu viðhaldsfólkini hjá KÍF komu upp úr setrunum, tá ið Karl Johan Djurhuus ein góðan minutt fyri leik-lok minkaði um munin til 22-23, men nærri komu kollfirðingar tó ikki.

Dysturin gjørdist eitt sindur dramatiskur beint fyri leiklok, tí tá fingu kollfirðingar tvey beinleiðis reyð kort.

**KÍF-VÍF 22-23(12-14)**
**KÍF:** Karl Johan Djurhuus 8(1), Damir Oros 6, Rógvi Weihe 2, Teitur Joensen 2, Arnbjørn Hansen 2, Gert Hansen 1, Mirko Milenkovic 1
**VÍF:** Sámal Joensen 5, Áki G. Olsen 4(2), Daniel Rapa 3, Regin Joensen 3, Agnar Joensen 3, Jákup Súni Andreasen 2, Harald Bjørgvin 2, Rói Lamhauge 1
**Brotskøst:** KÍF 3(1), VÍF 4(2)
**Útvísingar:** KÍF 1, VÍF 2
**Reytt kort:** KÍF 2
**Dómarar:** Petur Skeel Dahl og Hallur Danielsen

StÍF-Tjaldur 35-23(14-11):

# StÍF vann grannauppgerð

**Strandakvinnur tryggjaðu sær sunnudagin tvey stig, tá ið grannarnir á Skálafjørðinum, Tjaldur, vóru á vitjan á Skála**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var bert fyrstu løtuna av dystinum, at Tjaldur fylgdi við vertunum, tí so hvørt sum dysturin leið, fór StÍF frá gestunum.

### Skrædnaði eftir steðgin

Munurin var ikki so stórur fyri steðgin, 14-11 í hálvleikinum, og í seinna hálvleiki gekk leingi rættuliga javnt á, men móti endanum fall avgerðin. Tá setti heimaliðið ferð á, og seinastu fimm minuttirnar av dystinum skrædnaði fullkomiliga hjá Tjaldur.

Enn einaferð var tað unga Rebekka Justinussen, sum royndist best hjá strandakvinnum, og hon gjørdist toppskjútti við átta málum. Hjá Tjaldur vístu tær báðar nýggju útlendsku spælararnir, hvør dugur er í teimum. Maya Hecimovic skeyt átta mál, meðan Jasmin Devovic skey sjey.

**StÍF-Tjaldur 35-23(14-11)**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8(3), Ninna K. Johansen 7, Poula D.Olsen 6, Paula Høgnesen 6, Malan Petersen 5, Guðrun Ólavsdóttir 2, Johanna í Króki 1
**Tjaldur:** Maya Hecimovic 8(1), Jasmin Devovic 7, Mona Langgaard 5(3), Urd Potts 2, Elinbjørg Hammer 1
**Brotskøst:** StÍF 3(3), Tjaldur 7(4)
**Útvísingar:** StÍF 2, Tjaldur 6
**Dómarar:** Ragnar Simonsen og Rúni Mohr